## FCK skal hitta Ajax

Talan var sum heild um gott danskt lutakast, tá UEFA ólavsøkuaftan kastaði lut um dystirnar í Champions League og UEFA-Cup. Brøndby skjal í fyrsta umfarinum hitta Flora Tallin. Steypavinnararnir úr Randers skulu spæla móti FBK Kaunas, sum tvær ferðir hevur vitjað HB, og OB skal spæla spæla Llanelli úr Wales.

Størsti spenningurin tykist vera um lutakastið hjá FCK. Megnar danska meistaraliðið at basa finska MyPa, sum tapti fyrra dystin í Parkini við 2-0, verður tað hollendska stórfelagið, Ajax, sum skal spæla móti FCK.

**-mørk**

## B36 kundi hitt Metalurgs

Í árstalsfelagnum í Havn munnu tey enn hava ringan smakk í munninum, tá navnið, Metalurgs, verður havt á tungu. Tað var nevnliga liðið, sum fyri tveimum árum síðani gav B36 ein sekk upp á 8-0 í UEFA-Cup kappingini. Og vil heilt væl til, so kann B36 aftur í ár hitta Metalurgs. Skal hetta gerast veruleiki, so krevst tó í fyrstu atløgu, at B36 hølvar Fenerbache av í heimadystinum týsdagin, og í síðani skal Metalurgs gera tað sama, tá teir vitja hjá Dynamo Kiev, sum vann 4-1 í fyrru uppgerðini, sum varð spæld í Letlandi. So serliga sannlíkt er tað kortini ikki, má sigast.

**-mørk**



*Sjálvar søgdu tær, at FM var ikki tað sama, um tær ikki vunnu á ólavsøku. Men tað megnaðu tær so eisin iá ørnini, sum vann í stórum stíli*

*Mynd: álvur*

# Ólavsøkan staðfesti røttu meistararnar

**Einki hefti fyri manningini á Ørnini, sum ikki hevði roknað seg at vera sama slag av meistarum, um tær ikki høvdu vunnið á Ólavsøku**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Starturin var ikki heilt sannførandi, men kortini megnaðu kvinnurnar úr Sandavági at koma á mál meiri enn eina bátslongd frammanfyri Sílið, sum alt kappingarárið hevur verið argasti kappingarneytin hjá Ørnini.

Fyrsti báturin, sum í kappróðrinum á Ólavsøku megnaði at vinna bæði ólavsøkuróðurin og FM heitið, var Ørnin úr Sandavági.

Longu í heimasjógvi fyri stívliga tveimum vikum síðani tryggjaðu kvinnurnar á Ørnini sær FM heitið.

Tær vildu ógvuliga fegnar eisini vinna á Ólavsøku, og tað gjørdu tær væl og virðiliga. Sílið fekk besta startin, og Sílið var fremst fittan part av teininum. Munurin aftur til Ørnina var eina løtu fram ímóti einari bátslongd.

Men so var tað, at Ørnin fór at gera um seg. Stútt og støðugt tók Ørnin seg inn á Sílið, og tá ið tað restaðu trý hundrað metrar var javnt. Nakrar metrar reið um snarið. So glapp hjá Ørnini, og seinasta teinin undir Molanum var talan um uppvísningsróður hjá teimum úr Sandavági.

– Vit vistu, at vit noyddust at berjast fyri sigrinum, og tað gjørdu vit. Vit høvdu ikki havt verið eins rættir FM vinnarar, um vit ikki høvdu havt vunnið á Ólavsøku, sum vit eru tað, nú vit hava vunnið á Ólavsøku. Vit hava allar róð í fleiri ár, og vit vistu, hvat vit vildu, tá ið vit fóru undir venjingarnar. Tað hava vit rokkið, staðfesti fegna manningin á Ørnini, róðrarstoltleikin hjá Sandavági, sum ikki enn vita at siga, um tær nú eru so mettar av sigrum, at tær ikki fara at halda fram at rógva.

Sílið megnaði enn eina ferð at koma næstfyrst á mál og harvið at staðfesta, at manningin hjá Havnar Róðrarfelag er verdugir vinnari av silvurkrónunum, sum longu vóru tryggjaðar undan Ólavsøkuni.

Størsti spenningurin í FM høpi var um, hvør fór at vinna bronsumerkini. Ritan var best fyri í tí kappingini undan Ólavsøkuni, og við triðja plássinum á Ólavsøku tryggjaði Ritan sær bronsumerkini. Ritan var stóran skut undan Jallinum á mál. Tað vóru júst hesir báðir bátarnir, sum kappaðust um bronsumerkini.

Junkarin var fittan part av teininum við til at seta dám á. Á síðstu metrunum var Junkarin ov stuttur í kappingini um fjórða plássið, og so endaði hann á fimta plássinum, sum hann hevur verið á tríggjar ferðir. Tvær ferðir hevur Junkarin verið nummar fýra og tvær ferðir nummar seks.

**5-mannafør kvinnur – úrslit á Ólavsøku**

| Nr | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Ørnin | 4:51.19 |
| 2 | Sílið | 4:55.02 |
| 3 | Ritan | 4:59.05 |
| 4 | Jallurin | 5:00.05 |
| 5 | Junkarin | 5:00.07 |
| 6 | Drekin | 5:03.06 |
| 7 | Báran | 5:06.14 |
| 8 | Tjaldrið | 5:07.14 |
| 9 | Blikur | 5:30.19 |

# Gullið glitrar í Vágum

**Eldsálir skulu til fyri at fáa ungu og góðu ítróttarfólkini at taka kappróðurin í tí álvara, sum skal til, um tað skal hugsast um at gera seg galdandi**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Ólavsøkuaftan varð tað greitt, at bátar úr Vágum hava vunnið allar tríggjar FM kappingarnar millum kvinnubátarnar. Frúgvin úr Miðvági er gentumeistari, Ørnin úr Sandavági er kvinnumeistari millum 5-mannaførini, og Riddarin úr Miðvági er kvinnumeistari millum 6-mannaførini.

Í góðveðrinum sunnudagin varð skipað fyri móttøku í Sandavági og í Miðvági, og tað var týðuligt, at tað var fagnaður, gleði og sjálvandi stoltleiki um, at øll gullsettini endaðu í Vágum.

Tá ið spurt og fregnast verður í Vágum um orsøkina, er uppskriftin einføld. Tað eru eldsálirnar, sum uppmuntra ungdómarnar at manna bátarnar og at venja, sum eru fyrsta treytin fyri undanvindi, sigrum og meistaraskapum.

Sovornar eldsálir eru bæði í Sandavági og Miðvági. Ein av teimum, sum tað verður víst til, er Hansina á Plógv í Sandavági. Hon er formaður í róðrardeildini hjá SÍF, og hon hevur sentralan leiklut.

– Vit kenna ungu genturnar, og hvussu stinnar tær eru í eitt nú badminton. Tá ið vit hava uppmuntrað tær til at rógva, so ber tað bara til, um tað er onkur, sum vísir teimum áhuga, leggur teimum lag á og birtir uppundir. Tað er tað, sum vit her vesturi hava roynt at gera í mong ár, og tað er tað, sum ber úrslit við sær, er uppskriftin hjá Hansinu á Plógv, sum fegnast um gongdina bæði í Miðvági og Sandavági og um samstarvið, sum er millum bygdirnar.

Umborð á Riddaranum eru allar uttan ein úr Miðvági. Fleiri teirra eru skúlaðar sum rógvarar umborð á Ørnini úr Sandavági. Umborð á Frúnni eru tríggjar úr Sandavági, tríggjar úr Miðvági og ein úr Sørvági. Umborð á Ørnini eru allar uttan ein úr Sandavági.

Hvussu verður við framtíðini?

– Vit royna at seta við. Eg havi í ár sjálv stýrt Ørnini við gentumanning. Tær, sum rógva, fara nú í 9. flokk. Dóttir mín og eg eru úr Sandavági. Hinar fimm eru úr Miðvági. Tær hava víst stóran áhuga, og tær eru komnar væl eftir tí. Vit endaðu á sjeynda plássi á Ólavsøku, men munurin fram til nummar eitt var bara fimm sekund. Vit kappaðust leingi millum fremstu bátarnar. So kiksaði okkurt eitt lítið sindur, og so endaðu vit á sjeynda plássi. Marginalirnir vóru eisini hesa ferð smáir, men eg ivist onga løtu í, at genturnar fara at halda fram at rógva, og at tær næsta ár fara at standa seg betri, sigur Hansina á Plógv.

Hvussu við manningunum, sum í ár hava vunnið FM?

– Beint eftir Ólavsøku er alt eitt sindur óvist. Men tá ið tað líður nakað út á heystið, plaga nógvar av teimum, sum hava róð, at blíva spentar aftur. Tað ræður um at hava bul av rógvarum, sum tað ber til at fella aftur á, og samstundis at slúsa nýggjar rógvarar afturat.

Hví sæst so lítið til mannfólkini í Vágum í kappróðrinum?

- Uppskriftin er tann sama. Tað er neyðugt at finna onkran, sum vil taka sær av teimum. Vit høvdu manning til ein dreingjabát, men vit megnaðu ikki at taka okkum av teimum, sum vit vita, at tað eigur at verða gjørt, og so datt hetta niðurfyri. Tað er ikki tí, at dreingirnir ikki kundu havt áhuga fyri at roynt seg í kappróðri, veit Hansina á Plógv at siga.